## Dystir um vikuskiftið

**Hondbóltur**

1. deild kvinnur

| | | | |
|---|---|---|---|
| 15.02 | 14.30 | Kyndil-StÍF | Kristian Johansen & Sámal Hansen |
| 15.02 | 15.00 | VB-Neistin | Kristian Joensen & Karsten Joensen |
| 15.02 | 15.00 | Stjørnan-Søljan | Jákup S. Simonsen & Høgni M. Joensen |

**1. deild menn**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 15.02 | 16.00 | Kyndil-StÍF | Kristian Johansen & Sámal Hansen |
| 15.02 | 16.00 | KÍF-Neistin | Hannis Wardum & Uni Wardum |
| 15.02 | 16.00 | VÍF-H71 | Geir Wardum & Gunnar Gregoriussen |

**Flogbóltur**

Steypafinala kvinnur
14.02 14.30 TB-Dráttur

**Steypafinala menn**
14.02 16.30 SÍ-ÍF

## Hondbóltsstøður

**1. Deild kvinnur**

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Stjørnan | 5 | 4 - 0 - 1 | 449 | 344 | 105 | 19 |
| 2 | VB | 4 | 4 - 0 - 0 | 425 | 322 | 103 | 16 |
| 3 | VÍF | 5 | 3 - 0 - 2 | 439 | 357 | 82 | 15 |
| 4 | Neistin | 4 | 3 - 0 - 1 | 409 | 362 | 47 | 14 |
| 5 | StÍF | 4 | 0 - 0 - 4 | 357 | 420 | -63 | 5 |
| 6 | Søljan | 4 | 1 - 0 - 3 | 301 | 399 | -98 | 4 |
| 7 | Kyndil | 4 | 0 - 0 - 4 | 260 | 436 | -176 | 1 |

**1. Deild menn**

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Kyndil | 2 | 1 - 0 - 1 | 354 | 327 | 27 | 11 |
| 2 | Neistin | 2 | 2 - 0 - 0 | 345 | 311 | 34 | 10 |
| 3 | StÍF | 2 | 1 - 0 - 1 | 295 | 280 | 15 | 9 |
| 4 | VÍF | 2 | 0 - 0 - 2 | 311 | 300 | 11 | 6 |
| 5 | KÍF | 2 | 1 - 0 - 1 | 292 | 342 | -50 | 5 |
| 6 | H71 | 2 | 1 - 0 - 1 | 288 | 325 | -37 | 4 |

## Máltindarnir

**Kvinnur**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Simona Dziugyte | Neistin | 140 | (23) |
| Nicoleta Radu | Søljan | 117 | (22) |
| Aukse Vysniaskaite | VB | 117 | (30) |
| Ioana Rápa | VÍF | 104 | (25) |
| Katarina Stepanov | Stjørnan | 97 | (20) |
| Sóley Mikkelsen | VÍF | 91 | (20) |
| Daiva Tuomaite | VB | 87 | (15) |
| Nikolina Eyðbjørnsdóttir | VÍF | 82 | |
| Irina Rodevici | VÍF | 81 | |
| Milica Ergic | StÍF | 81 | (10) |
| Gurið Mortensen | VB | 79 | (6) |
| Annika Ljósstein | Stjørnan | 73 | (18) |
| Heidi Maria Akselsen | Søljan | 71 | (5) |
| Joan M. Djordjevic | Stjørnan | 70 | (24) |
| Lina Andriulyte | Neistin | 64 | |

**Menn**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Blagoje Buha | Neistin | 90 | (22) |
| Halgir D. Olesen | H71 | 89 | (9) |
| Dragisa Stojovic | Neistin | 88 | (3) |
| Hans Áki Dal-Christiansen | Kyndil | 82 | (29) |
| Petur Martin Poulsen | KÍF | 64 | |
| Ingi Olsen | VÍF | 60 | (20) |
| Agnar Joensen | VÍF | 59 | (7) |
| Áki Mørk | Neistin | 55 | (8) |
| Damir Oros | KÍF | 55 | (19) |
| Alexandur Johansen | StÍF | 54 | (21) |
| Jacob Jónsson | Kyndil | 51 | |
| Høgni Klein | Kyndil | 50 | (2) |
| Artur Johansen | StÍF | 49 | (10) |
| Sveinur Justinussen | StÍF | 45 | (4) |
| Josef Abrahamsen | Kyndil | 45 | (6) |

# Spenningur í botninum

**Bæði Stjørnan og VB eiga at rokna við fullari úrtøku undan vikuskiftinum**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Á pappírinum verður mest spennandi dysturin um vikuskiftið helst tann í Havn, har Kyndil og StÍF fara at takast.

Kyndil hevur at kalla alt kappingarárið verið avbyrgt í botninum, og týskvøldið fingu tær rættiligan avsmurning, tá Stjørnan var á vitjan. Móti StÍF á heimavølli er møguleikin at fáa stig kanska betri, enn hann nakran tíð hevur verið á árinum, og eitt nú megnaði Kyndil í styepakappingini at vinna á strandakvinnunum, sum mugu hugsa langt aftur fyri at minnast seinasta sigurin.

Móti Neistanum mikukvøldið var tó um reppið, at stig spurdust burturúr, og megnar StÍF at halda fast um avrikið í teirri uppgerðini, so er tað als ikki óhugsandi, at tær aftur kunnu leggja sjógv niður til botnin.

### VB skal reisa seg

Stjørnan má helst roknast sum størsti favoritturin á degnum, tá tær á heimavølli taka ímóti Søljuni. Ikki minst tóktist sigurin á Kyndli at prógva, at Stjørnan ikki hevur nakrar ætlanir um at slappa av eftir steypasigurin, og megna tær at leggja eins nógv fyri hesaferð, so skulu gestirnir úr Vágoynni ikki rokna við nøkrum sum helst.

Tað eigur Neistin heldur ikki at gera, tá tær fara til Vágs. Gaman í vann Neistin seinasta dystin í grundspælinum, tá tær vitjaðu í Vági, men síðani hevur verið langt millum glottarnar hjá Neistanum.

Raka tær dagin, so kunnu tær tó skapa nakað av spenningi, men hetta eigur tó ikki at vera nóg mikið til at steðga VB. Ikki minst eftir taptu steypafinaluna munnu vágskvinnurnar seta alt upp á at endurvinna FM-heitið, og tað kann ganga út yvir Neistan, at tær eru tær fyrstu, sum standa fyri eftir ósigurin seinasta leygardag.

# Føroyskt Fremad

**Teir fýra føroyingarnir vóru allir við frá fyrsta bríksli, tá Fremad Amager leikti javnleik móti Lyngby**

ÚTISETAR
*Jákup Mørk*

Donsku feløgini eru nú um at leggja seinastu hond á fyrireikingarnar til várhálvuna í danska kappingarárinum, og í Føroyum verður nógva staðni fylgt væl við, hvussu Fremad Amager fer at standa seg í næstbestu deildini.

Her eru fýra føroyskir leikarar, og teir vóru allir við frá fyrsta bríksli, tá Fremad á heimavølli tók ímóti Lyngby. John Heri Dam var vinstri bakkur. Jann Ingi Petersen var á miðvøllinum, og frammi í álopinum vóru teir báðir, Hjalgrím Elttør og Andrew av Fløtum.

Og dysturin var ikki meira enn níggju minuttir gamal, tá Andrew varð leiktur leysur og skoraði. Eitt sindur stuttligt mundi tað kanska kennast hjá Andrew, sum her skoraði móti Henrik Bødker, sum kanska verður komandi B36-málverji. Tað seinasta Andrew gjørdi fyri HB, var at skjóta meistaraheitið 100% víst í dysti móti júst B36.

Samanlagt gjørdist dysturin tó ikki so væl eydnaður hjá Fremad Amager. Lyngby javnaði longu tveir minuttir eftir leiðslu-málið frá Andrew, og síðani megnaði hvørgin parturin at skora. Teir fýra føroyingarnir vórðu allir skiftir út í dystinum, tá venjarin hjá Fremad Amager eisini vildi sleppa at royna breiddina í hópinum.

# Seinasta umfar í liðkappingini

**Leygardagin 14. februar endar liðkappingin í talvi. Sum vanligt verða allir dystirnir í seinasta umfari telvaðir undir somu lon, og í ár verður byrjað kl. 13 í Bygdarhúsinum í Hósvík**

TALV
*tíðindaskriv*

Stórur spenningur er um hvør verður Føroyameistari. Klaksvíkar Talvfelag hevur 25 stig (15 dystarstig), Kollafjørðar Talvfelag 23 1/2 stig (13 dystarstig) og Havnar Telvingarfelag hevur 21 1/2 stig. Klaksvík og Havnin møtast í síðsta umfari, meðan Kollafjørður telvar móti toftamonnum. Reglurnar siga, at um tað stendur á jøvnum í stigum millum oddaliðini, verður hugt eftir dystarstigunum. Stendur eisini á jøvnum har, verður umdystur.

Sandavágur flytur niður í 2. deild, eftir at hava verið eitt ár í bestu deildini.

Í hinum deildunum kunnu oddaliðini vissa sær fyrsta pláss, um teir bert møta til seinasta dystin, og harvið sleppa undan minus-stigum.

Klárt oddaliðið 2. deild er Vestmanna Talvfelag, HT3 er greitt á odda í 3. deild, og Klaksvíkar Talvfelag (a) vissar sær Føroyameistaraheitið í unglingadeildini við at møta til seinasta dystin.

Vikuskifti

Nr. 31 • leygardagur • 14. februar 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

Kirkjan er ikki ein lufttættur klivi



Lesið síðu 6–7



*Danska songstjørnan, Alex, hevur veruliga fingið vind í seglini tey seinastu árini. Besta ráðið hann hevur at geva ungum, ið vilja nakað innan tónleik, er miðvís venjing*

*Mynd: Nicolai Højland Lorenzen*

Alex:

# Haldið á at venja

**Miðvís venjing er gullkornið, sum songstjørnan Alex hevur at geva ungum songfuglum, ið vilja royna sínar veingir**

SAMRØÐA
*Ingrid Bjarnastein*
*ingrid@sosialurin.fo*

**Atletion, Århus:** "The morning light caresses your face on my pillow. You´re still asleep and you´re so beautiful..." Tryggur á pallinum. Hatturin liggur á skrá og sólbrillurnar hvíla trygt á nasarygginum. Pallurin er í Atletion í Århus. Áskoðararnir eru yvir 4000 í tali, men hetta tykist ikki nerva hann tað stóra.

Talan er um Alex. Nøkur kenna hann kanska frá Popstars tað árið, tá Jens Marni Hansen var við. Men nú hevur hann fingið ferð á solo-karrieruna, og hevur hann í dag tilknýti til Nexus Music, sum millum annað er mannað av Nik og Jay. Nik og Jay vóru á Føroyavitjan fyri hálvum árið síðani, og tað eru eisini teir, ið hava skrivað orðini til sangin, sum í løtuni toppar á donsku hittlistunum - "So beautiful".

Um tíðin verður spolað aftur til Popstars, so var støðan ein heilt onnur. Nervar og angist eyðmerktu 25 ára gamla Alex, sum endaði við at trekkja seg úr kappingini. Men røddini bilti ikki, og er hetta orsøkin til, at hann veruliga hevur fingið vind í seglini.

### Venjing

Lógvabrestirnir tróta ikki, tá lagið er liðugt. Pallurin er nú aftur í Århus, og Alex gongur tryggur av pallinum. Dagsins uppgáva er fullførd.

- Eg havi ikki nervar longur. Eg havi vant meg við at vera á pallinum, greiðir hann smílandi frá.

Sjálvt um hann sjálvur megnar at fylla ein konsertsal, so hevur hann tikið av tilboðnum at framføra til Melodi Grand Prix, sum varð hildið tann 7. februar.

- Slíkar framførslur gagna mær. Hetta er áskoðarafjøldin, sum eg leiti eftir. Frá teimum heilt ungu til tey eldru.

- Um óroyndir sangarar ynskja at koma fram, so er venjing tað besta ráðið eg kann geva teimum. Haldið á at venja. Gerið sum mamma tykkara sigur, og venji. "Øvelse gør mester", slær hann fast.

Hann dylir ikki fyri, at tankarnir leita út í heimin nú. Men heimsmarknaðurin tykist verða mettaður tá tað kemur til júst hansara slag av tónleiki, sum er ein blandingur av bleytum popptónleiki og rappi.

- Eg ætli mær ikki at satsa uppá USA, men eg vóni, at sleppa útum Danmark. Kanska Asia ella okkurt líknandi, sigur hann.

Hann leggur afturat, at hann vónar, at eisini sleppa til Føroya at framføra.

- Tað lá ikki fyri hjá mær at vera við tá Nik og Jay vóru í Føroyum fyrr í summar, sigur hann, og sær eitt sindur vónbrotin út. - Teir søgdu tað var so feitt, og hvør veit um eg ikki endi har onkuntíð sjálvur.